## *Starvslýsing:*

## *Fastur avloysari til Stropan á Kambsdali*

***Brennur tú fyri trivnaðinum og menningini hjá tí einstaka barninum?***
***Kundi tú hugsa tær at arbeitt miðvíst við "Betri vinir" og motoriskari sansastimbran?***

Vit sóknast eftir føstum avloysara, ið vil vera við í okkara menningararbeiði og sum ynskjur at starvast í einum umhvørvi, har ein kann vera við til at mynda og seta sín dám á okkara frálíka stovn við óteljandi møguleikum.

Stropin byrjaði sítt virksemi í septembur 2012 og er ætlaður 72 børnum í aldrinum 0-6 ár. Á stovninum eru fimm stovur: tvær vøggustovur, tvær barnagarðsstovur og ein miðlingastova. Á stovninum starvast 18 dugnalig, eldhugað, nærløgd, fjølbroytt og stuttlig starvsfólk, ið gleða seg at fáa teg í starvsfólkahópin.

Dagstovnurin liggur á Kambsdali, ið er ein sonn náttúruperla, ið setur stóran dám á okkara gerandisdag. Vit hava framúr góðar umstøður bæði innan- og uttandura, har áhugamálini og trivnaðurin hjá børnunum, eru okkara fremstu endamál.

Á stovninum arbeiða vit m.a. við "Betri vinir", ið er ein fyribyrgjandi verkætlan ímóti happing. Harafturat leggja vit stóran dent á motoriska sansastimbran og hava vit starvsfólk við viðkomandi útbúgvingum og royndum innan øki.

**Søkt verður eftir:**

- Føstum avloysara, ið kann arbeiða sjálvstøðugt, er ja-ligur, er ígongdsetandi, dugir at samstarva, taka ábyrgd, og dugir at seta sær mál, eins og at skapa ein spennandi og fjølbroyttan gerandisdag, har barnið er í miðdeplinum.

- **Føstum avloysara, at starvast 35 tímar um vikuna**. Tó kann tímatalið tillagast. Starvið er ætlað námsfrøðingi, og verður sett skjótast gjørligt. Um námsfrøðingur ikki søkir, kann

hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

**Uppgávan hjá fasta avloysaranum er,** at røkja fjølbroyttar arbeiðsuppgávur og kemur viðkomandi at starvast í ávíkavist vøggu-, miðlinga- og barnagarðsstovunum í samband við fráveru hjá starvsfólkum vegna feriu, sjúku og annað líknandi. Leiðslan leggur arbeiðsætlanina til rættis. Tó er týdningarmikið at megna broytingar við stuttum skotbráið.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið, ætlað námsfrøðingi, **verður sett skjótast gjørligt**. Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag millum kl. 07.15 – 17.00. Eftir áheitan frá leiðsluni kann fundarvirksemi eftir arbeiðstíð koma fyri.

Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarflokkur 2 - 8 fyri hjálparfólk og 11 – 24 fyri námsfrøðingar. Sambært §2 í barnaváttanarlógini hevur Fuglafjarðar kommuna skyldu til at fáa barnaváttan til vega, áðrenn umsøkjari verður settur í starv.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við prógvi, møguligum viðmæli/-um skal verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi: **Mikudagin 3. apríl 2024 kl. 12.00**

**Fuglafjarðar kommuna**
Í støð 5
530 Fuglafjørður
Ella umvegis teldupost á info@fuglafjordur.fo

Meira fæst at vita um starvið og um stovnin við at venda sær til Annu Joensen, leiðara á tlf. 238041 ella stropin@fuglafjordur.fo.